SPEKT | løgildir grannskoðarar

ARKIV

Búnaðargrunnurin

Ársroknskapur 2009

Staravegur 17 - Postboks 3258
FO-110 Tórshavn - Faroe Islands

Telefon +298 34 34 34
Telefax +298 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Sp/f. no. 2732

Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um grunnin	2
Ársfrágreiðing	4
Roknskaparátekning leiðslunnar	7
Átekning frá óheftum grannskoðara	8
Nýttar roknskaparreglur	9
Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2009	10
Fíggjarstøða 31. desember 2009	11
Notur	13

Upplýsingar um grunnin

Búnaðargrunnurin
Postboks 50
R. C. Effersøesgøta 4
110 Tórshavn

Telefon: 35 35 80
Telefaks: 35 35 81

Roknskaparár nr. 4

Heimstaður: Tórshavn

Stýrið

Valdir limir:

Elisabeth Eldevig, forkvinna
búskaparfrøðingur

Bjørn á Heygnum, næstformaður
advokatur

Niels Th. Pedersen
maskinmeistari

Marion á Lakjuni
cand.polit.

Anna Rubeksen
bóndi

Varalimir:

Katrina Maria Johannesen
løgfrøðingur

Óluva J. Midjord
yrkislærd búnaðarkvinna

Heðin D. Poulsen
løgfrøðingur

Jónfinn Thomsen
advokatur

Sigert Patursson
bóndi

Stjórn

Sjúrður Knudsen

Upplýsingar um grunnin

Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Peningastovnar

Føroya Banki
Eik Banki
Norðoya Sparikassi
Suðuroyar Sparikassi
Landsbankin
Jyske Bank

Ársfrágreiðing

Virksemi

Endamál Búnaðargrunnsins er at veita lán til landbúnaðin og at fíggja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina (Búnaðarstovuna), sambært løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 um Búnaðargrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 27 frá 30. apríl 2007.

Herumframt umsitur grunnurin festikontur og kontur fyri mist vetrarbit og stendur fyri allari innkrevjing av festileigum, traðarleigum og øðrum leigum.

Ársúrslitið

Inntøkurnar í 2009 eru 12.432 tkr. móti 5.963 tkr. árið fyri, og er hetta ein hækking upp á 6.469 tkr. Rentuinntøkur av útlánum vóru 4.584 tkr., av lánsbrøvum og avtaluinnlánum 6.418 tkr. og av innistandandi 1.005 tkr.

Samlaða hækkingin stavar í høvuðsheitum frá lánsbrøvum og avtaluinnlánum. Eisini er ein lítil minking í rentuinntøkum av innistandandi peningi og ein tilsvarandi vøkstur í rentuinntøkum av útlánum. Meira um hetta niðanfyri.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar hækkaðu við 133 tkr. úr 5.582 tkr. í 2008 til 5.715 tkr. í 2009. Hetta stavar frá natúrligum broytingum. M.a. er umsitingin er hækkað við 168 tkr., húsaraksturin er lækkaður við 291 tkr. og innbúgv við 77 tkr. Hetta kemst av, at bygningurin var høvuðsumvældur innan í 2008. Lønirnar eru hækkaðar við 343 tkr. og kemst hetta av natúrligum hækkingum og at nýtt starvsfólk byrjaði hálvan desember 2008.

Úrslitið aftaná avskrivingar og avsetingar móti tapi upp á skuldarar er 2.110 tkr. í 2009 móti 1.949 tkr. í 2008. Hetta er ein vøkstur upp á 161 tkr. og stavar frá omanfyrinevndu broytingum, umframt avsetingum móti tapi upp á 4.607 tkr.

Útlánini eru vaksin við 3.767 tkr. úr 95.284 tkr. til 99.051 tkr. og kemur hetta av vøkstri í útlánum upp á 8.374 tkr. minus avsetingar upp á 4.607 tkr.

Lánsbrøv og avtaluinnlán kastaðu munandi meira av sær í 2009 enn í 2008. Samanumtikið má sigast, at tað hevur verið ein góð loysn at keypa lánsbrøv, bæði tá hugsað verður um avkast og trygd.

Niðanfyri eru talvur, sum vísa gongdina á lánsbrøvum frá byrjan í 2001 til ultimo 2009.



	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	Miðal
Ognarrøkt	5,80%	6,93%	4,30%	3,10%	3,00%	3,00%	3,60%	-0,06%	5,11%	3,86%
EFFAS 1-5	5,80%	7,00%	4,21%	4,50%	2,87%	0,74%	3,22%	3,19%	4,26%	3,98%
Innlán	3,60%	2,95%	2,15%	2,15%	2,40%	3,19%	4,27%	4,81%	1,84%	3,04%



	Byrjan	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009
Ognarrøkt	100,00	105,80	113,13	117,99	121,65	125,30	129,06	133,70	133,62	140,45
EFFAS 1-5	100,00	105,80	113,21	117,97	123,28	126,82	127,76	131,87	136,08	141,87
Innlán	100,00	103,60	106,66	108,95	111,29	113,96	117,60	122,62	128,52	130,88

- Innlán (grønur litur) svarar til, at peningurin varð settur á innlánskontur, við hægst møguligari rentu til eina og hvørja tíð, ella tað, sum eisini kallast DK Repo renta.
- Effas 1 – 5 (reyður litur) svarar til lánsbrævamarknaðin, ella eitt sokallað indeks, sum okkara íløgur í lánsbrøv vera samanhildin við.
- Ognarrøkt (bláur litur) eru lánsbrøvini hjá Búnaðargrunninum.

Ovara myndin vísir rentuna p.a. fyri hvørt árið sær frá 2001 til 2009 og miðal rentuna fyri sama tíðarskeið. DK Repo hevur í miðal givið 3,04% meðan lánsbrøvini hava givið 3,86% í miðal fyri tíðarskeiðið.

Niðara myndin vísir eina samanlegging (akkumulering) av, hvussu nógvar krónur hvørt lánsbræv á 100 kr. hevur kastað av sær fyri árini 2001 til 2009. T.v.s. at lánsbrøvini hava givið 40,45 kr. fyri hvørjar 100 kr., meðan DK Repo hevði givið 30,88 kr. fyri hvørjar 100 kr. í sama tíðarskeiði.

Tøkur peningur er hækkaður úr 108,3 mió.kr. í 2008 til 140,7 mió.kr. í 2009. Hækkingin stavar m.a. frá inngjøldum fyri sølu av jørð og av at íløgurnar í lánsbrøv eru minkaðar og ístaðin settar á avtaluinnlán, eftir at bankapakki 1 kom í gildi.

Grunnurin er vaksin úr 111,1 mió.kr. til 113,2 mió.kr. Hetta kemur av rakstraravlopinum.

Festikontan er vaksin úr 184,4 mió.kr. til 193,7 mió.kr. Hækkingin stavar fyri størsta partin frá jarðarsølu. Her skal viðmerkjast, at týðandi upphæddir eru játtaðar av festikontu og vera útgoldnar fyri íløgur, sum eru í gerð í løtuni hjá festarum.

Viðmerkjast skal, at av nevndu 193,7 mió. kr. hoyra 11,3 mió. kr. til kontu fyri mist vetrarbit. Eisini skal viðmerkjast, at lógin fyri vetrarbit er broytt í mai 2009, soleiðis at mist bit fyri ognarhagar ikki longur verður goldið á kontu í Búnaðargrunninum, men beinleiðis til eigaran. Eisini er lógin broytt soleiðis, at tann parturin, sum hoyrir til landsjørð, hevur fingið aðrar treytir fyri at fáa pening útgoldnan.

Hendan lógarbroyting kemur at hava við sær, at tað ikki verður goldin eins nógvur peningur á kontu í Búnaðargrunninum fyri mist vetrarbit í framtíðini, sum undanfarin ár. Roknast kann eisini við størri útgjaldingum av kontu fyri mist vetrarbit komandi árini.

Grunnurin hevur gjørt uppskot til broyting av treytunum fyri fígging av festikontu, soleiðis at peningurin á festikontu í størri mun kann koma øllum landbúnaðinum í landinum at gagni og ikki sum støðan er í dag, har tað bert eru nøkur fá festir í miðstaðarøkjunum, sum standa fyri nógv størsta partinum av peninginum og serliga útjaðarin ikki hevur møguleika at fáa pening av festikontu.

Eisini hevur grunnurin skotið upp, at partar av peninginum kann nýtast til kanningar og nýggjar verkætlanir, sum kunnu koma samlaða landbúnaðinum til gagns.

Uppskotið er sent í Løgtingið til viðgerðar, men er ikki endaliga avgreitt enn.

Peningaviðurskifti:

Fíggjarjavnin er 309.820 tkr. Av hesum er eginpeningurin 306.961 tkr., sum svarar til 99,1%.

Roknskaparátekning leiðslunnar

Stýrið og stjórnin hava í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina fyri 2009.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við galdandi roknskaparásetingar. Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætt-vísandi mynd.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar.

Tórshavn, hin 17. juni 2010

Stjórn:

Sjúrður Knudsen

Stýrið:

Elisabeth Eldevig
forkvinna

Bjørn á Heygum
næstformaður

Niels Th. Pedersen

Marion á Lakjuni

Anna Rubeksen

Góðkendur á fundi stýrisins, hin / 2010

Fundarstjóri:

Átekning frá óheftum grannskoðara

Til stýrið í Búnaðargrunninum
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Búnaðargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2009 við leiðsluátekning, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, figgjarstøðu og notum.

Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttu roknskaparreglurnar. Henda ábyrgd ber í sær, at grunnurin støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttar verða hóskandi roknskaparreglur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at grunnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd, hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparreglurnar, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

Niðurstøða
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og figgjarligu støðu 31. desember 2009 og av úrslitinum av virksemi grunsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2009 samsvarandi nýttu roknskaparreglunum.

Tórshavn, hin 17. juni 2010
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Mirjam Haraldsen
statsaut. revisor

Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri Búnaðargrunnin er, eins og undanfarna ár, gjørdur eftir teimum roknskaparreglum, sum eru lýstar niðanfyri.

Um innroknan og virðisáseting í ársroknskapinum

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Inntøkur

Leiguinntøkur og rentur av lánum verða inntøkuførdar sambært útsendum rokningum.

Rentur av innistandandi peningi verða inntøkuførdar, tá ið tær verða tilskrivaðar í peningastovnum.

Útreiðslur

Útreiðslur verða tiknar við í tí roknskapartíðarskeiði tær viðvíkja.

Materiell støðisogn

Keyp av materiellari støðisogn verður útreiðsluførd í útveganarárinum.

Útlán og eftirstøður

Útlán og eftirstøður verða upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskriving ímóti tapi. Upphæddirnar verða mettar hvør sær.

Onnur áogn

Onnur áogn verður upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskrivingum ímóti tapi.

Lánsbrøv

Lánsbrøv verða upptikin til kursvirði við ársenda.

Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2009

	Nota	2009	2008
		kr.	kr.
Leiguinntøkur, netto	1	158.769	154.687
Rentuinntøkur v.m.	2	12.007.514	5.529.963
Sakarmálsgjøld		265.941	277.992
Inntøkur til samans		12.432.224	5.962.642
Umsiting	3	-676.289	-508.638
Húsarakstur	4	-208.683	-499.758
Starvsfólkaútreiðslur	5	-2.112.347	-1.769.093
Innbúgv v.m.	6	-27.320	-104.260
Annað	7	-20.000	0
Búnaðarstovan		-2.670.687	-2.700.000
Úrslit áðrenn avsetingar		6.716.898	380.893
Javning í avseting til tap upp á skuldarar		-4.606.900	1.568.000
Ársúrslit		2.109.998	1.948.893

Fíggjarstøða 31. desember 2009

	Nota	2009	2008
		kr.	kr.
OGN			
Støðisogn			
Materiell støðisogn			
Støðisogn til samans		0	0
Ogn í umferð		0	0
Áogn			
Útlán og eftirstøður	8	99.050.764	95.284.216
Onnur áogn	9	270.792	454.498
		99.321.556	95.738.714
Lánsbrøv		69.842.007	94.372.913
Tøkur peningur	10	140.656.452	108.280.642
Ogn í umferð til samans		309.820.015	298.392.269
OGN TIL SAMANS		309.820.015	298.392.269

Fíggjarstøða 31. desember 2009

	Nota	2009	2008
		kr.	kr.
SKYLDUR			
Eginpeningur			
Grunnurin	11	113.243.789	111.133.791
Festikontur	12	193.699.991	184.409.939
Kolagrevstrargrunnurin		16.803	16.803
Eginpeningur til samans		306.960.583	295.560.533
Skuld			
Stuttfreistað skuld			
Onnur skuld	13	2.859.432	2.831.736
Skuld til samans		2.859.432	2.831.736
SKYLDUR TIL SAMANS		309.820.015	298.392.269
Eventualskyldur og veðsetingar	14		

Notur

1 Leiguinntøkur

	2009	2008
	kr.	kr.
Festileiga	26.852	26.952
Traðarleiga	103.917	98.135
Festigjøld við skifti	28.000	26.700
Onnur leiga	0	2.900
	158.769	154.687

2 Rentuinntøkur v.m.

Rentur av útlánum	3.407.020	3.034.154
Rentur og kursjavningar av lánsbrøvum	2.414.609	-158.187
Rentur av avtaluinnláni	4.003.518	0
Rentur av innistandandi peningi o.a.	1.005.141	1.571.876
Rentur av eftirstøðum	1.177.226	1.082.120
	12.007.514	5.529.963

3 Umsiting

Veðhavaralýsingar	-1.600	-1.200
Løgfrøðilig hjálp	176.132	85.944
Serkøn hjálp	5.760	35.950
Innheintingarkostnaður	2.149	19.044
Postgjald	17.688	13.522
Grannskoðan	72.000	74.000
Roknskaparhjálp v.m.	16.600	16.600
Trygging	24.271	17.207
Tinglesing	88.800	-38.446
Ymiskt	66.422	44.373
Námsferðir	0	0
Edv-útreiðslur	47.555	13.979
Bókaútgáva	-1.358	-3.830
Telefon	32.570	32.088
Internet	37.560	33.577
Haldaragjald, bløð o.a.	21.885	15.020
Framtíðarlandbúnaður	0	0
Serkøn hjálp - Landbofyn	0	56.846
Aðrar skrivstovuútreiðslur	69.855	93.964
	676.289	508.638

Notur

4 Húsarakstur

	2009	2008
	kr.	kr.
Viðlíkahald	1.855	0
Reingerð o.a.	72.700	55.926
Ljós og hiti	35.509	56.666
Urtagarðurin	70.851	70.544
Kavarudding v.m.	3.120	4.520
Umbygging av skrivstovuni	4.352	287.241
Ávaringarskipan	14.400	14.200
Húsavarðatænastan	5.896	10.661
	208.683	499.758

5 Starvsfólkaútreiðslur

Lønir	1.524.262	1.221.117
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur	32.496	27.241
Arbeiðsloysistrygging	18.569	15.563
Barsilsskipanin	11.467	9.605
Eftirlønargjald	207.296	168.543
Lønir og lønargjøld til samans	1.794.090	1.442.069
Dagpeningur, Stýrið	303.370	306.861
Ferðapeningur, Stýrið	14.887	20.163
	2.112.347	1.769.093

6 Innbúgv v.m.

Innbúgv	27.320	104.260
	27.320	104.260

7 Annað

Skeið og landbúnaðartiltøk	20.000	0
	20.000	0

Notur

8 Útlán og eftirstøður

	2009	2008
	kr.	kr.
Ymiskar útlánskontur	119.447.655	113.938.292
Avdráttir og rentur, fallið til gjaldingar	35.168.836	32.305.728
Fallin festi- og traðarleiga	60.173	59.196
Avsett til tap	-55.625.900	-51.019.000
	99.050.764	95.284.216

9 Onnur áogn

Mvg-áogn	109.007	292.713
Onnur áogn	161.785	161.785
	270.792	454.498

10 Tøkur peningur

Kassapeningur	307	1.356
Føroya Banki	82.833.057	28.781.192
Eik Banki	46.516.941	69.552.338
Suðuroyar Sparikassi	239.942	222.217
Norðoya Sparikassi	4.663.112	4.321.159
Landsbankin	5.525.189	5.209.480
Jyske Bank	584.101	138.835
Postgiro	293.803	54.065
	140.656.452	108.280.642

11 Grunnurin

Salda 1. januar	111.133.791	109.184.898
Rakstraravlop	2.109.998	1.948.893
	113.243.789	111.133.791

Notur

12 Festikontur

	2009	2008
	kr.	kr.
Salda 1. januar	184.409.939	172.226.674
Søla av jørð	7.850.716	10.814.638
Inngoldið fyri vetrarbit	288.467	167.109
Inngoldið fyri vetrarfriðing	0	0
Inntøka av grótbrotum	1.070.606	1.083.419
Frábýtisútreiðslur	0	0
Leiga	544.742	501.585
Alistøðir	404.327	289.498
Endurgjald frá Landsverkfrøðinginum	223.901	0
Annað endurgjald	132.000	14.100
	194.924.698	185.097.023
Útgoldið, netto	-1.224.707	-687.084
Festikontur 31. desember	193.699.991	184.409.939
Ikki sundurgreinað inngjøld	0	0
	193.699.991	184.409.939

13 Onnur skuld

Skyldugar útreiðslur – Búnaðarstovan	2.727.696	2.700.000
Studningur samlikonta	53	53
Skyldugar útreiðslur – Føroya Gjaldstova	131.683	131.683
	2.859.432	2.831.736

14 Eventualskyldur og veðsetingar

Ongar veðsetingar hvíla á grunninum.